17. august 2016

Kunningardagur á Sjónámi

Gj. R. Ludvig

# Ráðstevna um trygd á sjónum

*** Føroysk fiskiskip í fokus ***

# Nøgdsemiskanning – 2009 & 2016

***Lýsing:*** Átak til tess at kanna arbeiðs- og trygdarumhvørvið um borð.

***Endamál:*** At betra um arbeiðs- og tygdarumhvørvið um borð.

***Kanningarháttur:*** *Gap-analysa*. Í 2009 sendi FF út 1100 spurnarbløð við 15 spurningum. Í 2016 ringdi SVS til 31 fiskimenn um somu spurningar.

***Afturboðan:*** *Í 2009 luttóku 227 (21%)*. Í 2016 luttóku 31 (100%). Luttøkan í 2016 er 14% í mun til luttøkuna frá 2009.

***Rákgongd:*** 2016-kanningin verður brúkt sum ein ábending um verandi trygdarstøðu.

# Spurnarblað frá 2009-kanningini

Skipaeftirlitið
Faroese Maritime Authority

## Nøgdsemiskanning - fiskimenn 2008

**Vegleiðing**
Tú verður vinarliga biðin um at svara spurningunum/útsøgninum eftir bestu sannføring. Til høgru eru tveir teigar ávikavist "**Tín meting**" og "**Hvussu týðandi er hetta fyri teg**". Tað er umráðandi, at tú bert setur **ein** kross í hvønn teigin høgrumegin.

**Tín meting**
Her biðja vit um tína meting av, hvussu samd/ur tú ert við útsøgnina.
**Hvussu týðandi er hetta fyri teg**
Her biðja vit um tína meting av, hvussu tú raðfestir hetta økið.

| | Tín meting | | | | | Hvussu týðandi er hetta fyri teg | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Als ikki samd/ur | Minni samd/ur | Samd/ur | Meira samdur | Heilt samd/ur | Als ongan týdning | Minni týðandi | Týðandi | Meiri týðandi | Sera stóran týdning |
| | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 |
| 1 Vit gera regluliga **bjargingarvenjingar** umborð | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |
| 2 **Bjargingarútgerðin** verður eftirhugd/viðlíkahildin regluliga | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |
| 3 **Landgongin/atkomuviðurskifti** verða brúkt og eru í góðum standi | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |
| 4 **Støðan/standurin** á arbeiðsamboðum umborð er góður | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |
| 5 **Støðan/standurin** á skipinum/bátinum sum heild er góður | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |
| 6 Eg kann **samskifta(málførleiki)** við alla manningina | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |
| 7 Skipið er útgjørt við **trygdarútger**, sum skal brúkast tá manningin arbeiðir á dekkinum s.s. Trygdarhjálmur, arbeiðsvestur o.a. | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |
| 8 **Maskinur**(t.d. kryvjimaskinur)og **spøl** eru avskerma og tryggja við neyðavbrótarum | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |
| 9 **Reinføri** á t.d. manningarhølum, wc o.ø. er nøktandi | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |
| 10 **Hvílitíðin** er nøktandi | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |
| 11 **Kosturin/maturin** umborð er (heilsu)góður | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

| | Ja | Nei |
|---|---|---|
| 12 Verður nýggj manning kunnað um **trygdarskipanir** áðrenn skipið siglir? | ☐ | ☐ |
| 13 Hevur tú gyldugt **trygdarcertifikat?** | ☐ | ☐ |
| 14 Hevur tú gyldugt **heilsuprógv(bláu bók)?** | ☐ | ☐ |
| 15 Ert tú greiður yvir hvar **tín bjargingarvestur** er? | ☐ | ☐ |

16 Um svarað er nei í spurningi **12 - 15** vinarliga greið frá hvi

17 Hevur tú aðrar viðmerkingar?

18 **Eg sigli við:**

| Útróðrarbáti | Línuskipi | Trolara | Flakatrolara | Nótaskipi | Farmaskipi | Ferðafólkaskipi | Øðrum |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

Skipaeftirlitið, box 26, FO-375 Miðvágur. Tel. 355600 Fax 355601 heimasíða: www.fma.fo - email: fma@fma.fo

# Skipabólkar í nøgdsemiskanningini 2009

- **227 luttakarar**
  - Línuskip 54
  - Trolarar 79
  - Flakatrolarar 30
  - Nótarskip 33
  - Útróðrarbátar 3
  - Farmaskip 3
  - Ferðafólkaskip 2
  - Onnur skip 23






Spurningar:

1. Vit gera regluliga bjargingarvenjingar umborð
2. Bjargingarútgerðin verður eftirhugd/viðlíkahildin regluliga
3. Landgongin/atkomuviðurskifti verða brúkt og eru í góðum standi
4. Støðan/standurin á arbeiðsamboðum umborð er góður
5. Støðan/standurin á skipinum/bátinum sum heild er góður
6. Eg kann samskifta (málførleiki) við alla manningina
7. Skipið er útgjørt við trygdarútgerð, sum skal brúkast tá manningin arbeiðir á dekkinum s.s. trygdarhjálmur, arbeiðsvestur o.a.
8. Maskinur (t.d. kryvjimaskinur) og spøl eru avskermað og tryggjað við neyðavbrótarum
9. Reinførið á t.d. manningarhølum, wc o.ø. er nøktandi
10. Hvílitíðin er nøktandi
11. Kosturin/maturin umborð er (heilsu)góður






# 2009-kanningin við 227 luttakarum.













# 2016-kanningin við 31 luttakarum.












# Nøgdsemiskanning – 2009 & 2016 framh...

***Úrslit 2009:*** Týðiligt gap ímillum "týdning" og "meting."

***Úrslit 2016:*** *Ábendingin vísir at trygdin er batnað munandi.*

***Niðurstøða:*** 2009-kanningin vísir at fiskimenn sum heild ikki eru nøgdir við trygdina. Men ábendingin frá 2016 vísir størri nøgdsemi har "týdningur og meting" eru samanfallandi.

**Viðmerking:** Sp. 1-4 og 8-15 snúgva seg um upplýsing og hugburð. Praktiskar mannagondir er vegurin fram. Sp. 5 inniber ein samansettan karakter, sum vit mugu liva við. Sp. 6 er lívsneyðugur fyri trygdina. Sp. 7 snýr seg um eitt myndugleikakrav, ið ikki verður sýnað.

# Hugleiðingar: 2009 - 2016

Hvørjar orsøkir viðvirkað til at trygdin um borð í fiskiskipum er batnað?



- Trygdarkanningar av føroyskum fiskiskipum 15 metrar og longri við heimild í kunngerð nr. 23 frá 12. apríl 2013.
- Fráboðan A frá 1. sept. 2013 um arbeiðsumhvørvi um borð í skipum.
- Fráboðan nr. 2 frá 11. des. 2012 um medisinkistu og sjúkuviðgerð um borð í skipum.
- Fráboðan nr. 2 frá 23. feb. 2009 um eyka brandtrygd um borð í ávísum føroyskum fiskiskipum.
- Dagførd útbúgvingartilboð og skeið.
- Adopterað trygdarmentan frá handilsflotanum.
- Almenn árin frá hugburðsbroytingum innan heilsu, trygd og umhvørvi á landi.

Áminning: *Løgtingslóg nr. 165 frá 21. desember 2001um trygd á sjónum*

## Reiðarans ábyrgd:

§ 24. Reiðarin skal síggja til, at brek við skipi ella útgerð av týdningi fyri trygd, arbeiðsumhvørvi ella dálking, sum hann er vorðin kunnugur við, verða umvæld uttan drál.

Stk. 2. Reiðarin skal syrgja fyri, at skipið verður sýnað sambært galdandi reglum og hevur gildug loyvisbrøv.

Stk. 3. Reiðarin skal tryggja skiparanum umstøður at lúka tær skyldur, ið hvíla á honum.

**Áminning:** *Løgtingslóg nr. 165 frá 21. desember 2001um trygd á sjónum*

## Skiparans ábyrgd:

§ 25. **Skiparin** skal síggja til, at skipið er í góðum standi til trygdar- og heilsuumstøður, og at arbeiðið umborð verður forsvarliga lagt til rættis.

Stk. 2. **Skiparin** skal síggja til, at allar innrættingar fyriskrivaðar til fyribyrging fyri havdálking, eru í góðum standi og kunnu nýtast til endamálið.

Áminning: *Løgtingslóg nr. 165 frá 21. desember 2001um trygd á sjónum*

## Ábyrgdin hjá fyristøðumanni, manning og hjá øllum

§ 26. Tann, ið stendur fyri arbeiðinum umborð, skal síggja til, at manningin er neyðturviliga vard móti vanlukkum og heilsuskaða, og skal við leiðbeining og eftirliti tryggja, at arbeiðið verður gjørt á tryggan hátt við atliti til vaanlukku- og heilsuvandan.

§ 27. Manningin skal gera sítt til, at tey ráð, ið tikin eru at tryggja móti vanlukkum ella skaða, virka eftir ætlan.

§ 28. Tað liggur á øllum, ið umborð eru, at virða tey trygdarráð, ið tikin verða til tess at tryggja, at skipið er sjódygt, og at mannalív á sjónum eru tryggjað á bestan hátt.